# 27 uppsagnir nýtt fyri fíggjarnevndini

*Fíggjarnevndarformaðurin sigur seg undrast á stóra uppsagnartalið, Landssjúkrahúsið meldar út. Undir fíggjarnevndarviðgerðini varð roknað við eini lækkan á 5 starvsfólk*

John Johannessen

Bjarni Djurholm sær tríggjar orsøkir fyri, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum nú meldar út, at 27 fólk mugu sigast úr starvi.

Ein møguleiki er, at Helena Dam á Neystabø og embætisfólkini í Almanna- og Heilsumálastýrinum hava feilmett tørvin hjá Landssjúkrahúsinum í tí tilfari, ið varð latið trivanaðrnevndini til viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum.

Ein møguleiki er, at Karsten Hansen og embætisfólkini í Fíggjarmálastýrinum ikki hava endurgoldið Landssjúkrahúsinum kompensatiónina á 4,6 prosent fyri vøksturin í lønarútreiðslum, ið eru mettar at vera 6,5 prosent.

Seinasti møguleikin er, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki dugir at raðfesta og stýra útreiðslunum.

### Hoyrdu um fimm størv

Bjarni Djurholm vísir á, at sambært tølunum, fíggarnevndin fekk frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, eru 687 størv á Landssjúkrahúsinum. Í fíggjarlógaruppskotinum varð roknað við einari lækkan í starvsfólkatalinum á 5 fólk, soleiðis, at tað eftir eina náttúrliga útskifting vóru 682 starvsfólk eftir á Landssjúkrahúsinum eftir stuttari tíð.

– At neyðugt verður at siga 27 fólkum er fullkomiliga nýtt fyri mær og als ikki í samsvari við tær upplýsingar fíggjarnevndin hevur fingið í málinum. Tølini, ið vóru fyriløgd okkum, eru als ikki í ætt við hasi tølini, sum sjúkrahússtjórin nú meldar út.

Fíggjarnevndarformaður vísir í hesum sambandi á, at fíggjarnevndin bert kann fyrihalda seg til tey tølini og tær upplýsingar, hon hevur fingið frá Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Um tað, sum í løtuni hendir, bert er ein ræðumynd, sum sjúkrahússtjórin hevur sett í gongd, veit Bjarni Djurholm ikki at siga. Hann vísir á, at tíðin má vísa, um tað er sjúkrahúsleiðslan ella myndugleikarnir, ið siga ósatt.

### Klaksvíkin hækkað

Í sambandi við óskilið á Landssjúkrahúsinum ynskir Bjarni Djurholm at skoyta uppí, at Klaksvíkar Sjúkrahús í fíggjarlógaruppskotinum fekk lægri játtan í mun til hini sjúkrahúsini.

– Fíggjarnevndin mælti tó tinginum til at hækka játtanina til Klaksvíkar Sjúkrahús. Hetta varð gjørt, men talan var um eina játtan á 4,6 prosent, ið samsvarar við tað endurgjaldið, fíggarmálaráðharrin vildi geva fyri lønarhækkanina, sigur Bjarni Djurholm og vísir á, at munurin millum tey 6,5 proentini, hækkanin kostar sjúkrahúsunum og tey 4,6 prosentini, ið verða endurgoldin.

### Tolir ikki heitið

Hvat galið er í málinum um Landssjúkrahúsið, dugir Bjarni Djurholm ikki at meta um, men hann sigur seg vera noyddan at staðfesta, at sjúkrahúsið ikki longur tolir at bera sítt heiti.

– Sjúkrahúsið er í so vánaligum standi og hevur so stóran tørv á tólum, at tað skal nógv til, áðrenn tað kann dagførast, so tað aftur tolir heitið Landssjúkrahús, sigur hann.

Í sama sambandi vísir hann á, at sjúkrahúsið afturat játtanini fyri í ár, eisini hevur fingið eina játtan til medicoteknisk tól, harímillum fýra milliónir til røntgen.

Umframt tað við medicoteknisku tólunum, hevur fíggjarnevndin einki fingið at vita um nakran vanda á Landssjúkrahúsinum í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini.



*Bjarni Djurholm hevur onga ábending fingið um 27 uppsagnir á Landssjúrahúsinum undir viðgerðini í Fíggjarnevndini*

# Vandi fyri miðsavnan

*Løgmaður er ikki fullvísur í, at vit fáa fleiri landspolitikarar, verða Føroyar gjørdar til eitt valdømi*



*Løgmaður ivast í, um vit fáa betri landspolitikarar av at gera Føroyar til eitt valdømi*

John Johannessen

Løgmaður heldur tað vera avgerandi, at politikarar virka fyri alt landið. Men hann er ikki sannførdur um, at loysnin at røkka hesum máli er tann, sum Jákup Sverri Kass, tingmaður Sjálvstýrisfloksins, vísir á í viðmerkingum til fyrispurning um valskipanina, hann hevur orðað løgmanni.

Jákup Sverri Kass, tingmaður, heldur, at føroyska valskipanin sum skjótast eigur at verða broytt. Hann vísir í fyrispurningi til løgmans á, at verða Føroyar eitt valdømi, so noyðast politikarar at hugsa landspolitiskt. Harafturat heldur hann, at hetta fer at noyða allar politikarar at seta seg í samband við alt Føroya fólk, og ikki bert tey, sum búgva í júst teirra valdømi.

Við hesum grundgevingum spyr hann løgmann, um landsstýrið í løtuni arbeiðir við nøkrum ætlanum um at broyta føroysku valskipanina soleiðis, at øll valdømini verða løgd saman til eitt.

Men løgmaður ivast í, um hetta er fragasta loysnin. Hann vísir á, at tað ikki er vist, at vit røkka málinum um at fáa meira gjøgnumførdan landspolitikk, um vit broyta valskipanina og fáa miðsavnað politikararnar á tingi til at vera frá miðstaðarøkinum.

Løgmaður ivast nevniliga í, um tað er heilt rætt av Jákup Sverra Kass at samanbera løgtingsval við fólkatingsval, har Føroyar eru eitt valdømi og nógvir av atkvøðuslúkarunum nevniliga eru av bygd.

Tó fer løgmaður sjálvsagt at viðgera fyrispurningin og svara honum í tinginum. Men tað verður eftir sjónarmiðum samgonunnar og ikki persónligum, staðfestir hann.

# Umvæla høvuðsmaskinuna á Lómi

*Maskinan á Lómi verður í hesum døgum høvuðsumvæld á Tórshavnar Skipasmiðju*

John Johannessen

Seinastu viku sóðust vaktarskipið Gormur og Skúmarin hjá Tórshavnar Skipasmiðju fara sleipandi út eftir Havnarvág, og mikudagin sóðust tey koma sleipandi inn aftur við skipinum.

Tórshavnar Skipasmiðja hevur áttikið sær arbeiðið at høvuðsumvæla maskinuna á Lómi, mála botnin og gera annað viðlíkahaldsarbeiði.

Fyri at koma til at mála botnin á Lómi er sjálvsagt, at skipið má takast upp. Men Lómur er so mikið stórt skip, at tað ikki ber til at taka hann upp á Tórshavnar Skipasmiðju. Tí var tað, at Gormur og Skúmarin fóru sleipandi inn í dokkina á skipasmiðjuni á Skála við honum.

Tórshavnar Skipasmiðja eigur skipasmiðjuna á Skála, og tí valdi hon at senda Lóm inn á Skála at fáa botnin málaðan, meðan skipið kortini lá uttan maskinu.

Frá Skipafelagnum Føroyar frætta vit, at Lómur skal vera liðugt umvældur 20. januar.

Lómur og systurskipið, Blikur, eru ikki heilt nýggj skip, og tí hyggur reiðaríðið allatíðina eftir nýggjum skipum, men sum Sosialurin skilir, er einki skip funnið, og sostætt eru ongar ítøkiligar ætlanir um at skifta skipini út enn á sinni.



*Vaktarskipið Lómur og Skúmarin hjá Tórshavnar Skipasmiðju fóru í seinastu viku sleipandi inn á Skála við Lómi, har botnurin skuldi málast*

**Mynd: Álvur Haraldsen**



# Vilja hava føroyska lóg fyri fjølmiðlar

*Landsstýrið fer at leggja uppskot fyri tingið um at gera føroyska fjølmiðla–ábyrgdarlóg. Orsøkin er, at danska løgmálaráðið ikki vilja góðtaka broytingarnar, sum løgtingið vil hava í donsku lógini, áðrenn hon verður lýst í Føroyum*

Eyðun Klakstein

Landsstýrið fer nú at mæla til, at ein føroysk fjølmiðlaábyrgdarlóg verður gjørd.

Ætlanin hevur annars verið at lýsa donsku lógina fyri Føroyar, men danska løgmálaráðið hevur boðað frá, at tað vil ikki góðtaka tær broytingarnar, sum løgtingið krevur í donsku lógini, áðrenn hon skal lýsast í Føroyum.

Tí heldur landsstýrið, at rættast er at fara undir arbeiðið at gera eina føroyska lóg fyri fjølmiðlarnar.

Stríðið í málinum um donsku lógina er tann sokallaða fjølmiðlanevndin, sum skal setast á stovn í Føroyum. Hendan nevnd hevur til uppgávu at viðgera klagur frá fólki, sum halda seg verða illa viðfarnar av fjølmiðlunum.

Í Danmark eru átta limir í fjølmiðlanevndini, og javnvág er millum limirnar hjá fjølmiðlunum og hjá almenninginum. Løgtingið samtykti í 1997, at í føroysku fjølmiðlanevndini skulu fjølmiðlarnir bara eiga tveir av seks limum, meðan hinir limirnir verða umboð fyri almenningin.

Hetta vil løgmálaráðið ikki góðtaka, eins væl og tað heldur ikki vil góðtaka, at teir skulu gjalda fyri arbeiðið hjá nevndini. Í Danmark eru tað fjølmiðlarnir sjálvir, sum gjalda fyri nevndina.

### Fyrireika uppskotið

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, sigur, at hann í løtuni situr og fyrireikar eitt uppskot, sum fer at mæla til, at arbeiðið við at fáa donsku lógina lýsta í Føroyum verður steðgað. Ístaðin verður farið undir at gera eina føroyska fjølmiðlaábyrgdarlóg.

Metingin hevur annars verið, at fjølmiðlaábyrgdarlógin er danskt málsøki, men Høgni Hoydal heldur, at tað ber til at tosa fyri, at føroyingar sjálvir kunnu gera lóg fyri fjølmiðlarnar.

Tað heldur landsstýrið í hvussu so er vera best, nú løgmálaráðið ikki vil góðtaka broytingarnar hjá løgtinginum, og so er spurningurin um løgtingið hevur somu áskoðan.

Høgni Hoydal væntar, at hann verður liðugur við uppskotið hesa vikuna, og so skal tað leggjast fyri flokkarnar, áðrenn tað verður borið í løgtingið.

# Rás 2 hevur gjørt skrá

*Fyrsta skráin hjá Rás 2 er merkt av tónleiki og undirhaldi, men øðrvísi útvarpstilfar er eisini á skránni*

Eyðun Klakstein

Rás 2 er nú klárt við síni fyrstu skrá.

Hóast rásin hevur verið í luftini í meira enn ein mánað, hevur eingin verulig skrá verið gjørd. Men eftir at programleiðari varð settur á rásini, hevur verið arbeitt dúgliga fyri at fáa gjørt eina skrá.

Og seinasta vikan hevur givið úrslit. Nú kunnu fólk lesa í millum annað *Hygg og hoyr* her í blaðnum um, hvat er á skránni hjá kappingarneytanum hjá Útvarpi Føroya.

Óla Jákup Rólantsson, programleiðari á Rás 2, sigur, at fyrsta skráin er merkt av, at orkan hjá rásini er avmarkað, men hann vónar, at tað fer at bera til at betra skránna framyvir.

Millum teir rættir, sum lurtararnir hjá Rás 2 framyvir fáa á borðið, er prát við skip og sjófólk, sending um húsamarknaðin og eina breyt, sum framvegis koyrir, hóast sendingin hevur mist hevltina av navninum, síðani hon flutti úr ÚF og á Rás 2.

– Vit hava fingið nógv hugskot frá fólki, sum halda at tað manglar okkurt í útvarpinum, og onkur av hesum hugskotum hava vit avgjørt at brúka, sigur Óla Jákup Rólantsson.

Millum hesi hugskot er sendingin, har prátað verður við skip og sjófólk. Ætlanin er, at hendan sending skal geva lurtarunum tíðindi um, hvar tey ymsu skipini eru, hvat tey fiska, nær tey koma heim og hvussu annars gongur.

– Hetta halda vit hevur manglað í útvarpinum, og vónandi kunnu vit framyvir geva fólki fleiri upplýsingar um skipini og fiskiskap, sigur Óla Jákup Rólantsson.

### Ítróttur og andaligt tilfar

Rás 2 fer eisini at gera eina sending um føroyska húsamarknaðin, har prísir, útboð og eftirspurningur fara at verða tikin fram.

Ítróttur og barna- og ungdómstilfar er eisini á skránni. Ítróttur verður fyri tað mesta umrøður undan ítrottarkappingum, tí Rás 2 hevur ikki loyvi at senda beinleiðis frá ítróttarkappingum. Hendan rættin eigur Útvarp Føroya einsamalt.

– Vit hava merkt stóran áhuga millum tey ymsu sersambondini fyri, at ítróttarkappingar verða viðgjørdar, áðrenn tær fara fram, tí í løtuni er mesta umrøðan eftir at kappingarnar hava verið, sigur Óla Jákup Rólantsson.

Kirkjur og samkomur sleppa eisini upp í part á Rás 2, hóast andaliga rásin Lindin skjótt fer at senda.

– Tað er stórur eftirspurningur eftir andaligum tilfari, og tað skal eisini hava innivist hjá okkum, sigur Óla Jákup Rólantsson.

Rás 2 fer millum annað at senda frá gudstænastum og møtum.



*Rás 2 sendir nú fyri fyrstu ferð eftir eini veruligari skrá*

### Løgtingið er við

Á fyrstu skránni hjá Rás 2 er nógvur tónleikur og undirhaldssendingar, meðan langt er ímillum veruligu tíðindasendingar og tær journalistisku sendingarnar.

– Vit hava ikki orku til at fara undir gravandi journalistikk, men vit ætla at gera onkrar slíkar sendingar, sigur Óla Jákup Rólantsson.

Ein tíðindasending verður tó á skránni allar dagarnar, og henni fer fyrrverandi útvarpsmaðurin Sonni Smith fyrst og fremst at taka sær av.

Sendingin *Løgtingið* er ætlað eini gjøgnumgongd av teimum málum, sum eru fyri í løgtinginum. Rás 2 ætlar at greiða frá uppskotum og viðgerðini, tey fáa í tinginum.

### Seriøsar sendingar

Einasta rásin, føroyingar hava at samanbera við, tá tað kemur til kappingarneytar hjá Útvarpi Føroya er Atlantic Radio, sum langt síðani er farið í søguna. Nýggja rásin sigur seg hava lært av teirri rásini.

– Vit vita, hvussu vit ikki skulu gera, og fólk skulu verða púra vís í, at vit fara at leggja okkum eftir at gera seriøsar sendingar, sigur programleiðarin á Rás 2.

– Vit fara als ikki at góðtaka ónærisligan ella ófantaliga málburð á rásini, og vit fara at leggja okkum eftir at brúka gott føroyskt mál.

Atlantic Radio fekk skotið í skógvarnar, at teir nærum førdu undirgravandi virksemi móti føroyska málinum. Rás 2 ætlar sær ikki at koma í somu somu støð, og programleiðarin, sum hevur eina fortíð í ÚF, sigur, at Rás 2 fer at krevja sama seriøsitet av sínum sendingum, sum Útvarpið ger.

– Men ein munur millum okkum og Útvarp Føroya er, at teir fáa lurtaragjald frá øllum føroyingum. Tað fáa vit ikki, og tí hava vit í byrjanini avmarkaða orku til at gera sendingar, sigur Óla Jákup Rólantsson.


Heimabio

STATOIL

Nýggir filmar hvørja viku



THE MATRIX



LOKKEDUEN



NOTTING HILL



THE MUMMY

**Leiga videofilmar á hesum støðum:**

Statoilstøðin í Gundadali tel. 314770

Statoilstøðin í Kollafirði tel. 421083

Statoilstøðin í Saltangará tel. 449133

Statoilstøðin í Klaksvík tel. 457353

Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001

Statoilstøðin í Sørvági tel. 332001

Statoilstøðin í Leirvík tel. 443360

STATOIL

*støðirnar kring landið*